## Rúsevnakervi avdúkað

Løgreglan í Noregi og Svøríki hava avdúkað eitt stórt altjóða rúsevnakervi, sum millum mannað hevur verið virkið í teimum báðum londunum. Sjálv avdúkingin byrjaði í Noregi á sumri í 2007, og hesa tíðina hava myndugleikarnir lagt hald á næstan eitt tons av rúsevnum. Reidar Bruusgaard hjá norsku løgregluni sigur við Ritzau, at umleið 30 fólk eru tikin í Noregi og Svøríki, og at umframt nógv rúsevni sum cannabis og amfetamin hevur løgreglan lagt hald á einar seks milliónir krónur og fleiri vápn.



## Rakettmaðurin fallin

Hamas-leiðarin Amir Mansi doyði í einum ísraelskum álopi um vikuskiftið. Sambært ísraelska herinum var Amir Mansi leiðari á rakettdeildini hjá Hamas í Gaza og hevði avgerandi ávirkan á tey nógvu rakettálopini á mál í Ísrael. Ein talsmaður fyri ísraelsku herleiðsluna sigur, at Amir Mansi royndi at verja seg, tá ísraelskir hermenn kringsettu hann nærhendis Gedera leygardagin. Amir Mansi var útbúgvin verkfrøðingur.

## Litrajáttan heldur enn krónur

**Torbjørn Jacobsen, fyrrverandi fiskivinnumálaráðharri, sum fyrr hevur úttalað seg nógv um vaktar- og bjargingarskipini, metir, at skilabest hevði verið, um ein serlig litrajáttan var til oljuna, til skipini hjá landinum**

OLJA

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Torbjørn Jacobsen heldur tað vera undarligt, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, hvørja ferð ein broyting er í oljuprísinum noyðist niðan í tingið at biðja sær eykajáttan.

- Tað ber ikki til, at mann blívur við at brúka krónutøl, tá mann tosar um olju. Mann skuldi heldur gjørt eina skipan, soleiðis, at ein játtan var givin í litrum. Tí tá árið byrjar, er mann klárur yvir, hvussu nógvir litrar skulu til, men tað er ongin møguleiki fyri at vita, hvussu oljuprísurin verður, sigur Torbjørn Jacobsen. Hann leggur tó afturat, at hetta er eitt uppskot, hann helst ikki fer at leggja fram.

- Eg fái illa nakað ígjøgnum. Tað ber illa til hjá einum í andstøðu at leggja eitt tílíkt uppskot fram, men eg haldi absolutt, at hetta er nakað vit mugu tosa saman um í flokkunum til eina komandi fíggjarlóg, sigur Torbjørn Jacobsen. Skipini hann tosar um, eru tey hjá Strandferðsluni, Fiskiveiðieftirlitinum og hjá Fiskirannsóknarstovuni.

Í samband við Tjaldrið og Brimil metir Tórbjørn Jacobsen, at tey í ár hava eina nøktandi játtan, um oljuprísurin ikki eksploderar.

# Vaktarskipini lógu h

**Sambært tølum, sum Sosialurin hevur fingið, liggja vaktar- og bjargingarskipini hjá Fiskiveiðieftirlitinum tilsamans í 346 av teimum 730 døgunum, sum skipini tilsamans kunnu vera úti í einum árið. Tó er betring í væntu í ár**

SPARINGAR

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Spurningurin er, um tørvur er á fleiri enn einum vaktarskipið í økinum kring Føroyar, tí sambært tølum frá Fiskiveiðieftirlitinum, sum Sosialurin hevur fingið innlit í, eru skipini, Tjaldrið og Brimil, bara í sigling umleið helvtina av tíðini, sum tey tilsamans kunnu vera úti. Tjaldrið er skipið, ið hevur ligið meira. Heili 201 dag lág skipið, sum merkir, at tað bara var úti í 164 dagar í fjør.

Samanborið við 2006 lógu skipini tilsamans 92 dagar fleiri í fjør.

- Tað, sum hendi í fjør, var, at oljuprísurin bleiv høgur. Hetta gav okkum stórar eykaútreiðslur, og tá oljan er ein hin størsti variabulin í útreiðslunum, so sigur tað seg sjálvt, at vit høvdu ov lítið av peningi, sigur Elmar Højgaard, stjóri á Fiskiveiðieftirlitinum. Hann greiðir frá, at hetta er høvuðsorsøkin til, at skipini vóru so lítið úti í fjør.

- Vit hava hert eftirlit við í samgonguskjalinum, so vit mugu syrgja fyri, at vit ikki koma í somu støðu. Oljan var sera dýr í fjør, og tí gjørdist tað so trupult at fáa tað at passa, men nú er oljuprísurin minkaður. Tí skuldi tað borið til at hava eitt nøktandi vaktarhald í ár, metir Jacob Vestergaard, landsstýrismaður við Fiskivinnumálum.



*Elmar Højgaard, stjóri í Fiskiveiðieftirlitinum, harmast stórliga um støðuna í fjør. Tó metir hann, at støðan verður nógv betri í ár, so støðið á eftirlitið kemur upp á tað sama sum í 2007*



Í fjør var ein fyribils fíggjarlóg fram til 13. juni, og tað hevði við sær, at stórar sparingar blivu gjørdar, tí játtanin eftir øllum at døma, ikki fylgdi stóru hækkingini í oljurprísinum.

### Minst eitt skip

Hóast skipini lógu heilt nógvar dagar í fjør, so var altíð okkurt skip í sigling.

- Tað var ongantíð soleiðis, at bæði skipini lógu. Danir hava eisini skip í økinum, so fyri tað mesta vóru minst tvey vaktar- og bjargingarskip tilsamans, sigur Elmar Højgaard, sum tó ikki metir hetta vera nøktandi.

Í sama viðfangi nevnir Elmar Højgaard, at tað er

## Brimil

| Ár | Viðlíkahald | Feria | Sparing/annað | Í sigling |
|---|---|---|---|---|
| 2006 | 25 | 42 | 46 | 252 |
| 2007 | 50 | 25 | 55 | 234 |
| 2008 | 21 | 42 | 77 | 220 |

*Kelda: Fiskiveiðieftirlitið. Tølini eru í døgum*